## Føroyar dumpa í gransking og menning

Føroyar nýta bert 0,8 % av bruttotjóðarúrtøkuni til gransking, meðan t.d. Danmark nýtir 2,6 %, og Ísland nýtir 3 %. Ovast á listanum er Svøríki, sum nýtir 4 % av bruttotjóðarúrtøkuni til gransking. Kanningin, sum Granskingarráðið hevur latið gera, vísir, at føroyska vinnulívið, hóast lítla gransking, er nýskapandi samanborið við onnur lond. Verður hugt nærri at hesum upplýsingum, gerst tó greitt, at nýskapandi føroyska vinnulívið ikki er slóðbrótandi, men endurnýggjar seg við at herma og keypa nýggja tøkni, sum er ment til umstøður í øðrum londum. Eru sólur á Tinganesi hálendsk grafitti? spyr Helgi Michelsen frá Fornminnissavninum og prikar hervið hol í sagnir um sólur og merki á helluni á Tinganesi. Hann gevur eina nýggja útlegging av, hvat hesi tekin merkja, og kemur til ta niðurstøðu, at flestu merkini eru yngri, enn vit hava hildið, og tey eru ikki rist av føroyingum. Sjófuglurin er í minking, og Bergur Olsen frá Fiskirannsóknarstovuni, rópar nú varskó í grein í Frøði. Fuglateljingarnar hjá Berguri Olsen vísa eina støðuga minking av floygdum ritupisum í Skúvoy í nøkur ár. Støðan er so álvarsom, at ongin ritupisa er komin undan í 2004, 2005 og 2006. Støðan minnir um tey ringu árini síðst í 1980-árunum, tá ið minkingin í sjófugli boðaði frá stórari minking í fiskiskapinum fylgjandi árini. Føroya Fróðskaparfelag gevur út Frøði í samstarvi við granskingarstovnarnar í Føroyum. Í blaðnum hesa ferð eru greinir um Púka Ljómurnar hjá Sjóvarbóndanum og um, hvussu føroyskar huldur broyta lit fyri at verja seg móti álopum. Silvurfiskurin er eitt skaðadjór, men samstundis eitt hugtakandi elligamalt skordjór. Bókin Nordatlanten og Troperne verður ummæld. Frøði kostar kr 48 í leysasølu og kemur út tvær ferðir um árið. Tað ber til at gerast haldari fyri kr 85 um árið og fáa blaðið sent.

# Steðgið tunlinum

**Tað mælti Annita á Fríðriksmørk til í umrøðu síni av løgmansrøðuni í tinginum í dag. Íløgan stendur ikki mát við nyttuna, tí vit tosa um milliardaupphædd, helt Annita**

POLITIKKUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Stórar íløgur eru gjørdar í farleiðina suður til Sands, bæði vegur, stór og dýr ferjulega og nýggj bilferja. Hesar íløgur eiga at verða gagnnýttar í eitt ávíst áramál, áðrenn vit fara at tosa um nýggjar íløgur í milliardaflokkinum.

So bersøgin var Annita á Fríðriksmørk á tingsins røðarapalli í dag, tá hon viðgjørdi ólavsøkurøðu løgmans.

Annita vísti á, at tað mátti metast at koma undir marglæti, at byggja ein so dýran tunnil út í oynna, bara so at sandoyingar kundu sleppa inn á megin-økið til tey frítíðartilboð, ið her eru.

- Eg vænti ikki, at eitt øki sum Sandoyggin fer at blóma fyri tað, um tey fáa ein undirsjóvartunnil, sum tey fara at brúka eftir arbeiðstíð, vísti Annita á Fríðriksmørk á.

Men hon fekk kortini ikki stóra undirtøku fyri hesum sjónarmiðinum, heldur ikki frá sínum egnu floksfeløgum. Bæði Finnur Helmsdal og Høgni Hoydal gjørdu greitt, at teir tóku ikki undir við Annitu í hesum, og vístu á, hvussu stóran týdning tað hevur at binda landið saman við føstum sambandi.

- Hygg at bygdum sum Vestmanna og Kvívík, tær høvdu ongan møguleika havt at ment seg á ein slíkan hátt, sum tær hava, um ikki fast samband var til hesar bygdir, segði Finnur Helmsdal.

Eisini Høgni Hoydal vísti á, at fast samband til eitt øki kemur ikki bert økinum til góða, men øllum samfelagnum.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og Jørgen Niclasen úr Fólkaflokkinum vístu somuleiðis á tað alneyðuga í at binda økini saman, og at alt samfelagið fekk gagn av at fast samband fekst.

- Gævi sagt, at trupulleikin var so einfaldur, sum eitt dansistað ella ein frítíðarhøll, segði løgmaður í síni viðmerking.

Einasti, sum bar brá av at stuðla undir tilmælið hjá Annitu, var Olav Enomoto úr Sambandsflokkinum, sum vildi hava eina gjølligari viðgerð av málinum, áðrenn endalig støða varð tikin til Sandoyartunnilin.

### Barsilsskipanin

Annita á Fríðriksmørk kom eisini inn á barsilsskipanina og ta sannroynd, at tað »mangla« 2000 kvinnur í Føroyum, í mestan mun í árunum millum 20 og 40 ár.

Men hinvegin eru føroysku kvinnurnar raskar at eiga børn, tí í meðal eiga tær 2,6 børn, og hetta er væl hægri enn meðaltalið í grannalondum okkara.

- Hetta er einasta orsøkin til, at fólkatalið kvinkar uppeftir, tí tilflytingin er stagnerað, vísti Annita á Fríðriksmørk á.

Hon filtist í hesum sambandi at viðferini, sum barsilsskipanin hevur fingið seinastu árini frá samgonguni.

- Neyðugt er at gera barsilsskipanina góða og nøktandi. Tað einasta samgongan hevur gjørt, er at lækka útgjaldið og stytta um barnsburðarfarloyvið, segði Annita á Fríðriksmørk.

Hon helt, at mest sømandi hevði verið, at barnsburðarfarloyvið var 52 vikur. Samgongan hevur sett tað til 24 vikur, hóast mælt verður til, at barnsburðarfarloyvið í minsta lagi skal vera 26 vikur.

Og í hesum málinum fekk Annnita størri undirtøku, serliga frá Finni Helmsdal og Høgna Hoydal.



*Annita á Fríðriksmørk mælti til at steðga Sandoyartunnilin. Men hon fekk ikki stóra undirtøku fyri hesi hugsanini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Meiri pening takk

**Tá Hans Pauli Strøm helt sína røðu á løgtingi stutt fyri miðdag í dag, avvísti hann, at sparingar stóðu fyri framman á almanna- og heilsuøkinum**

POLITIKKUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í røðu síni í sambandi við viðgerðina av løgmansrøðuni, slepti Hans Pauli Strøm einari lítlari bumbu. Upp á ein fyrispurning frá Kára P. Højgaard, sum tingmaðurin hevði sett fram í gjár, upplýsti landsstýrismaðurin fyri almanna- og heilsumálaráðið, at hann á ongan hátt fór at verða við í sparingunum, sum samgongan annars samdist um fyrst í vikuni.

- Sparingar? Forget it!

So bersøkin var Hans Pauli Strøm í svari sínum til Kára P. Højgaard.

Landsstýrismaðurin vísti á, at fleiri verkætlanir vóru í gongd og aðrar í umbúna, so á hansara økið bleiv ikki talan um nakra sparing, tvørturímóti.

- Vit fara at brúka meiri pening á almanna- og heilsumálaøkinum, tað fer komandi fíggjarlóg at vísa, segði Hans Pauli Strøm.

Hvussu hetta kann sameinast við semjuna, sum varð gjørd millum samgonguflokkarnar fyrr í vikuni, eftir at løgmaður hevði kallað inn til fund, er ikki greitt. Men tann semjan gekk heilt greitt út upp á, at sparast skuldu einar 100 milliónir í rakstrinum, og at hvør landsstýrismaður sær skuldi finna fram til, hvussu hann ætlaði at fremja sparingar á sínum øki.

Skal semjan haldast, og skal málið náast um sparingar upp á 100 milliónir, so er greitt, at hini seks ráðini skulu semjast um eina sparing, sum verður 100 milliónir umframt tað, sum Hans Pauli Strøm økir um sína játtan.



*Forget it! Hans Pauli Strøm ætlar sær avgjørt ikki at seta sparingar í verk á sínum málsøki. Tvørturímóti fer hann at nýta meiri pening á komandi fíggjarlóg*